# Eingin bati í toskinum

Yvirlitstrolaringar hjá íslendsku fiskirannsóknarstovuni vísa, at toskaárgangurin í fjør var í minna lagi og á somu støðd sum árgangirnir í 2005 og 2006. Tvey skip hjá rannsóknarstovuni og tríggir trolarar gjørdu kanningar kring landið, og tað vísti seg, at mest var til av toski norðanfyri og út av Vestfirðum. Fiskifrøðingarnir siga, at 2004-árgangurin vísir seg framvegis at vera vánaligur, meðan teir eldru árgangirnir eru heldur størri enn í fjør.




# Vilja hava Norðpólin

Kanada hevur nú av álvara gjørt vart við í stríðnum um, hvør eigur ræðisrættin til økið við Norðpólin. Kanadiskir granskarar, sum hava kannað viðurskiftini í Ellesmore Island, sum er í útnyrðing úr Grønlandi, siga, at norðuramerikanska landgrunnastøðið røkkur allan vegin frá Ellesmore Island til Norðpólin. Tí kann Kanada av røttum krevja ræðisrættin yvir póløkinum, siga teir. USA, Russland og Danmark vilja eisini hava póløkið.

*Kanadiumenn siga nú, at teir eiga rættin til Norðpólin*

*Mynd: KNR*

# ðugt til

kast, spjótkast, hæddarlop, longdarlop og stangarlop, umframt alla renning, harundir eisini forðarenning, sigur Rúni Abrahamsen.

Hann sigur, at tala er um fyrsta floks tilfar til rennibreytina.

Hetta er sama slagið av undirlagi, sum liggur á tjóðarstadion í Oslo í Noregi, Bislet. - Vit hava hildið okkum til norskan standard, og talan er sjálvandi um altjóða góðkent undirlag, sigur Rúni Abrahamsen.

Men sjálvt um teir hava hildið seg til norskan standard, so hava teir eisini kanna eftir, hvat verður nýtt í Hetlandi og Íslandi.

- Tað er serliga við atliti at váta føroyska veðurlagnum, at vit hava valt hetta slagið av undirlagi, sigur Rúni Abrahamsen.

Tað er bygt eitt lítið hús, sum hevur skiftingarfasilitetir, men bert í minni mun. Svimjihøllin liggur jú nær við. Eisini verður bygt eitt minni hús við endan av stadion ætlað útgerð so sum bukkum til forðarenning og aðra kasti- og lopútgerð.



*Bilrøðirnar vóru óvanliga langar á Hvísnesvegnum í morgun*



*Jóhanna Christiansen og Jaspur Johannesen hava góðar vónir um nýggja matvøruhandilin. Grundarlagið undir handlinum er ovari partur av Havnini og Hoyvíkin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggjur handilin í Havn

**Leygarmorgunin letur upp nýggjur matvøruhandil við Sundsvegin í Havn. – Vit hava góðar vónir, sigur annar eigarin av hesum INN-handlinum, Jóhanna Christiansen við Sosialin. Grundarlagið fyri handlinum er millum annað tey 3000 fólkini í Hoyvík**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Hesar seinastu dagarnar hevur nógv virksemi verið innanfyri og uttanfyri Termovirkið við Sundsvegin.

Uttanfyri hava menn stríðst við at leggja asfalt á stóra økið til bilarnar, meðan eigararnir báðir, Jaspur Johannesen og Jóhanna Christiansen og onnur hava stríðst innanfyri við at seta hillar upp og at seta vørur uppá pláss.

Arbeiðið er nú komið so væl áleiðis, at klárt er at taka ímóti fyrstu viðskiftafólkunum fyrrapartin í morgin.

- Ja, hetta hevur verið strævið, men nú er alt komið uppá pláss, sigur Jóhanna, tá vit høvdu hana í telefonini í morgun.

Hesin fjórði INN-handilin er um 500 fermetrar til støddar, og hevur allar tær vanligu vørurnar, ið krevjast til eitt húsarhald.

Upplatingartíðirnar eru slíkar, at farast kann til handils árla á morgni og seinast á kvøldi allar dagar í viku, uttan sunnudag, tí tá er afturlatið.

### 110 bilar

Hesi seinnu árini er ovari partur av høvuðsstaðnum, og serliga Hoyvíkin vaksin øgiligt.

Her finnast onkrir matvøruhandlar frammanundan, men bæði Jaspur og Jóhanna hava kortini góðar vónir um at grundarlag eisini er fyri teirra handli.

- Okkara handil liggur á tí perfekta plássinum í Havn. Her koyra bilar í stórum tali framvið hvønn einasta dag, og tí skuldi ligið væl fyri hjá fólki at komi inn í INN.

- Vit hava eisini gjørt umstøðurnar hjá bileigarunum so góðar sum yvirhøvur gjørligt. Her verður nevniliga pláss fyri ikki færri enn 110 bilum, sigur Jóhanna Christiansen.

Tað verður Jaspur Johannesen sum skal reka henda fjórða INN-handilin, sum kanska ikki verður tann seinasti. Aðrir møguleikar verða alla tíðina kannaðir.

- Vit lukka ikki av, og siga at hetta verður tann seinasti handilin í INN-samtakinum, staðfestir Jóhanna.

## In at handla

Tað var fyri fimm árum síðani, at fyrsti INN-handilin lat upp við Norðskála.

Síðani hevur tað verið rættiliga in at fara undir slíkar handlar kring landið. Í dag eru teir tríggir og í morgin klokkan 10 letur altso tann fjórði upp.

Eftir at fyrsti handilin lat upp í 2003, lat samtakið upp tveir aðrar handlar í 2006 – annan í Klaksvík og hin triðja í vesturbýnum í Havn.

Nú stendur so tann nýggjari og ovari parturin av Havnini fyri tørni, tá tann fjórði handilin letur upp í morgin við Sundsvegin í Havn.

Í dag eru um 100 fólk á lønarlistanum í teimum fýra INN-handlunum kring landið.